## Nakrar samrøður eru eftir

Vit hava nakrar samrøður eftir, sum vit gjørdu á Vestnorden Travel Mart í síðstu viku í Keypmannahavn, og eitt nú fara vit at tosa við fólk, sum hava bussferðir í Føroyum. Vit høvdu eisini prát við GreenGate Incoming, sum bæði høvdu seljarar og keyparar við á Vestnorden Tavel Mart. Á myndini síggja vit umboð fyri 62 (stig) Norður, Mariu og Kent, og kanska vit fara at spyrja tey, hvussu ferðavinnustevnan nú eydnaðist fyri teirra virksemi. Samlaða talið av føroyskum útbjóðarum var umleið 12, harav tey størstu flutningsfeløgini, Atlantic Airways og Smyril Line, bæði vóru við.



# Útnorður vil hava felags skrivstovu



*Per Hansen, formaður í NATA, situr høgrumegin Súsannu Sørensen, ið vit síggja uttast til vinstru á myndini. Súsanna er leiðari á ferðavinnudeildini í uttanríkisráðnum. Hini umboðini, sum her sita á tíðindafundi á Vestnorden Travel Mart, eru úr Íslandi og Grønlandi*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Ferðavinnusamstarvið NATA, sum stendur aftanfyri Vestnorden Travel Mart, vil nú hava eina felags skrivstovu, sum kann skipa fyri ferðavinnusamstarvinum í útnorði. - Enn er tó eingin avgerð tikin um, hvar henda skrivstova verður, sigur formaðurin í NATA, Per Hansen, sum starvast á ferðavinnudeildini í uttanríkisráðnum**

TRAVEL MART

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

NATA er stytting av North Atlantic Tourism Association, sum er heitið á ferðavinnusamstarvinum millum londini í útnorði, Føroyar, Ísland og Grønland. Hvørt landið hevur trý umboð í NATA.

Per Hansen, sum starvast á ferðavinnudeildini í uttanríkisráðnum og er formaður í samstarvinum, sigur, at avtalan millum londini varð undirskrivað í 2006, og í 2007 kom NATA so í gongd. Soleiðis hevur hetta samstarv millum londini í útnorði nú sløk trý ár á baki.

- Endamálið við NATA er at menna ferðavinnu og at fremja samstarv millum londini á ferðavinnuøkinum.

Formaðurin heldur, at samstarvið hevur virkað rímiliga væl.

- Vit hava bygt samstarvið upp og hava nú funnið røttu rytmuna, og eg haldi, at hetta er við at koma upp á pláss.

Per Hansen heldur, at samstarvið hevur virkað væl í ár, men tey fyrstu tvey árini vóru meira at kalla royndarár.

- Nú er samstarvið við at koma í eina góða legu, sum formaðurin tekur til.

### Tvey høvuðsmál

Meðan Vestnorden Travel Mart var í Keypmannahavn mikudagin og hósdagin í síðstu viku, helt leiðslan í NATA fund, har tvey høvuðsmál vóru á skránni.

Per Hansen sigur, at ein partur av arbeiðnum hjá samstarvinum er at hjálpa virkjum og stovnum í hesum trimum londunum við at veita teimum stuðul, sum tey kunnu søkja um til ymiskar verkætlanir.

- Her býttu vit nakað út, sigur hann.

Eitt annað mál, sum eisini var á skránni á NATA-fundinum, var sjálv ferðavinnustevnan, Vestnorden Travel Mart. Her tosaðu umboðini um, hvussu ferðavinnustevnan kann mennast í framtíðini.

- Niðurstøðan var, at fyri at menna tiltakið frameftir eiga vit at seta á stovn eina skrivstovu, sum skal taka sær av samskiping og menning – og fyri at fáa ein størri kontinutet í ferðavinnustevnuna frá einum ári til annað.

Per vísir á, at tað hevur verið rættiliga nógv soleiðis, at neyðugt er líka sum at byrja av nýggjum hvørja ferð, tá stevnan flytir ímillum londini.

- Við eini felags skrivstovu høvdu møguleikarnir at samskipa arbeiði verið nógv betri, leggur hann aftrat.

### Ráðharrar við

NATA er tó ikki komið til nakra niðurstøðu um, hvar ein slík skrivstova kann verða.

- Nei, tað hava vit onga støðu tikið til enn. Fyrst skulu vit kanna eftir, hvussu vit kunnu gera hetta. Vit skulu finna út av, hvørjum uppgávum skrivstovan skal taka sær av, og hvussu ein fíggjarætlan kann koma at síggja út.

Per Hansen sigur, at alt hetta verður neyðut at kannað fyrst, áðrenn NATA tekur nakra endaliga støðu um ætlanina.

- Men vit hava so í útgangsstøðinum tikið støðu til, at vit halda hetta vera bestu loysnina, leggur hann aftrat.

Formaðurin vísir á, at avtalan millum londini í útnorði um NATA er eitt úrslit av tí, sum ferðavinnuráðharrarnir í hesum londum komu til.

-Tað er so avtaluna, sum varð undirskrivað í 2006, sum vit vilja fremja í verki, og ferðavinnuráðharrarnir í hesum trimum londunum hava eisini víst framhaldandi áhuga við at vera við á Vestnorden Travel Mart. Hetta er forumið, har teir møtast at tosa um ferðavinnu, sigur Per Hansen, formaður í NATA.








*Lítil ivi er um, at Vestnorden Travel Mart kann gerast uppaftur betri, um umstøðurnar fyri samskiping og sambandi millum fyrireikarar og framsýnarar gerast betri við eini felags skrivstovu*

*Myndir: Sámal Bláhamar*